Farin í dvala fyri veturin

Týsdagin var Stril Safety á Tvøroyri og skipaði tilbúgvingarútgerð upp. Honm verður nú løgd á goymslu hjá OSR- Føroyum á Tvøroyri, har hon verður goymd, til leitingin undir Føroyum verður tikin upp aftur næsta ár.

Oljufeløgini, sum leita eftir olju undir Føroyum, hava nú riggað av fyri veturin og tilbúgvingarútgerðin er farin í land aftur á Tvøroyri

VETRARDVALI
Áki Bertholdsen

Oljufeløgini, sum leita eftir olju undir Føroyum, eru nú farin í vetrardvala og hesa vikuna hava tey riggað av.

Tað hevur ført eitt sindur av virksemi við sær ymsastaðni í Føroyum, eisini á Tvøroyri, har tilbúgvingarmiðstøðin er.

Týsdagin var hjálparskipið í frálandsvinnuni, Stril Safety, á Tvøroyri og skipaði tilbúgvingarútgerð upp.

Stril Safety hevur ligið til reiðar úti á oljuleiðunum við tilbúgvingarútgerð, skuldi eitt óhapp hent, sum kravdi, at olja varð tikin upp av sjónum. Nú er útgerðin so aftur løgd á goymsluna hjá OSR- Føroyar (Oil Spill Response), á Tvøroyri.

OSR er felagið hjá Paula Einarsson á Tvøroyri, sum hevur fingið sáttmálan við tey fýra samtøkuni, sum leita eftir olju undir Føroyum um at tilbúgving.

Tvs, at OSR skal vera til reiðar við útgerð at basa eini oljudálking, skuldi eitt óhapp hent.

Síðani í summar hevur OSR havt útgerð umborð á hjálparskipinum Stril Safety, sum hevur ligið við pallarnar, til reiðar at tikið upp, skuldi olja likið á sjógv.

Nú skal útgerðin goymast á Tvøroyri, til farið verður aftur undir boringarnar, væntandi næsta summar. Og tá kemur so aftur eitt skip á Tvøroyri eftir útgerðini og leggur seg hjá boripallinum úti á leiðunum.

Tá verður tað Agip, sum fer at leita eftir olju undir Føroyum.

OSR ikki í dvala

Hóast útgerðin nú er løgd á goymslu fyri veturin, merkir tað ikki, at arbeiðið hjá OSR liggur stilt.

Í næstum fær OSR tilbúgvarútgerð, sum skal umborð á Brimil. Tað er útgerð, sum Brimil skal hava til at basa møguligari oljudálking undir landi, um eitt óhapp skuldi hent, sum førir slíka dálking við sær, sum Vaktar- og Bjargingartænastan hevur ábyrgdina av.

Spurningurin er, um útgerðin verður sett upp umborð á Brimli, so at hon altíð er tøk. Men er tað ikki pláss til at hava útgerðina standandi umborð á Brimli og at hon tískil fer at forða manninginni í arbeiðnum annars, er ætlanin at rigga til, so at útgerðin kann standa á landi, men at hon kann fáast umborð og setast á dekkið í eini knappari vending.

Talan er m.a. um útgerð, sum sýgur olju upp av sjónum.

Annars fær OSR eisini í næstu framtíð eisini tveir treylarar við ymsari útgerð, sum verður sett upp á plássum í landinum, har tað er skjótt at koma eftir henni. Annar treylarin skal setast í Runavík og hin antin í Havn ella í Klaksvík. Frammanundan stendur ein treylari á Tvøroyri.

Hetta eru treylarir, sum eru pakkaðir við útgerð, og sum skjótt kunnu koyra á staðið, um oljudálking tekur seg upp framvið landi, ella inni á firðum.

Somuleiðis er ætlanin at halda skeið fyri fólki kring landið í at brúka útgerðina. Men annars er tað tað vanliga arbeiði at halda at røkja útgerðina, sum veturin skal brúkast til.

Arbeiðsbáturin er hentur at hava umborð. Tað er hann, sum togar oljusperringar upp á pláss í einum boga rundanum eina oljudálking. Nú verður hann settur undir tak á Tvøroyri

Borgarstjórin í Havn, Jan Christiansen, heitir á foreldur um at lata dagstovnunum brúkaragjaldið, hóast hesir eru stongdir vegna. Hann mælir foreldrum til at bíða eftir niðurstøðu frá Kommunusamskipan Føroya, sum ætlar at gera eitt felags útspæl

Mælir foreldrum til at gjalda sum vant

Borgarstjórin Jan Christiansen mælir foreldrum at børnum, ið ikki fáa ansing vegna verkfallið hjá pedagogunum, um at rinda brúkaragjaldið sum vant. Hann sigur, at seks tær størstu kommunurnar fara at taka hetta málið upp á fundi og vónandi finna tær eina felags niðurstøðu

VERKFALL
Stefan í Skorini

– Eg vil heita á foreldur, sum ikki fáa børnini ansaði, um at gjalda brúkaragjaldið til dagstovnin fyri fyrst, sigur Jan Christiansen, borgarstjóri í Hann.

Hann vísir á, at tað kann fáa stak óhepnar fylgjur, sum vit ikki kenna, um foreldur gera sum teimum lystir. Jan Christiansen hevði tí dámt best, um foreldur bíðaðu eftir niðurstøðuni frá Kommunusamskipan Føroya, áðrenn tey taka málið í egnar hendur.

Tann 13. desember fer Kommunusamskipan Føroyar, sum er felagið hjá seks teimum størstu kommununum í Føroyum, at umrøða júst hetta málið á stýrisfundi, og tær ætla at gera eina felags niðurstøðu.

Jan Christiansen vil ikki siga nakað um, hvørja niðurstøðu kommunurnar væntandi koma fram til, tí tað er nakað tíðliga at úttala seg um tað enn.

– Um kommunurnar finna ein ójavna og koma fram til, at foreldur ikki eiga at gjalda, so verður ein eftirregulering gjørd, sum verður líka fyri øll. Tí er best um foreldur gjalda sum vant og bíða eftir okkara niðurstøðu, sigur Jan Christiansen.

Órímiligt

Borgarstjórin heldur tó, at foreldur ikki eiga gjalda fyri eina tænastu, sum tey ikki fáa. Hann vil tó ikki binda seg at geva foreldrum nakað lyfti.

Hann tekur undir við, at núverandi støða er heldur órímilig hjá foreldrum, ið missa arbeiðsløn og mugu lata barnagentum løn fyri at ansa sínum egnu børnum, ið ikki sleppa í dagstovnin, tí tey hava verið í hesi støðu ov leingi. Alt meðan tey samstundis skulu gjalda brúkaragjaldið til barnagarðin, sum tey ikki brúka.

Lønarhækkingin hjá pedagogunum tað fyrsta árið verður 5% við afturvirkandi kraft aftur til 1. mars, og foreldur skulu eisini vera við at gjalda hesa lønarhækkan.

Borgarstjórin í Havn vísir staðiliga aftur, at kommunurnar royna at draga samráðingarnar út og harvið fáa eitt drúgt verkfall fyri peningaliga vinningin. Borgarstjórin vil heldur hava ein enda á verkfallinum sum skjótast.

Býráðið sparir í dag góðar 100.000 krónur um dagin, meðan pedagogarnir ikki eru til arbeiðis. Útmeldingarnar frá samráðingunum benda tó á, at ein semja verður funnin skjótt.

Bankin mælir til at gjalda

Fleiri foreldur hava steðgað gjaldinum til dagstovnarnar, so leingi eingin ansing verður veitt. Tey bíða eftir, hvussu leingi verkfallið varir, og taka síðani støðu til, hvussu nógv tey skulu lata barnagarðinum.

Fleiri, ið hava spurt í bankanum, hvussu tey skulu bera seg at við hesum, hava fingið tey ráð, at tey skulu halda fram við at gjalda, tí tað kann koma teimum aftur um brekku, um tey ikki lata dagstovninum brúkaragjaldið.

Føroyar Kommunufelag fer at hava fund fríggjadagin. Hóast málið um brúkaragjaldið ikki er á skránni, so fara borgarstjórarnir óivað at kjakast um hetta.

Carita Bjørklund, formaður í Føroya Pedagogfelag, hevur fyrr sagt við blaðið, at foreldur ikki eiga at gjalda fyri ta tíðina, pedagogarnir hava verið í verkfallið, og Bjørn á Heygum, advokatur, sigur, at foreldur hava góða orsøk at seta spurnaðartekin við, um tey eiga at gjalda fyri nakað, tey ikki fáa.

Verið varin við jólamatgerðini

Tað er umráðandi, at jólamaturin verður borðreiddur kókandi heitur, og restirnar skulu setast í kuldaskáp sum skjótast

MATGERÐ
Stefan í Skorini

Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur gjørt eina leiðbeining, ið hevur til endamáls at bjarga fólki undan búkilsku av bakteriu.

Mælt verður til at vera sera varin. Jólarættirnir skulu borðreiðast kókandi heitir, og maturin skal setast í kuldaskápið beint sum liðugt er at eta. Hesi eru boðini, um tú vilt sleppa undan búkilsku vegna bakteriu.

Um jóltíðir verður nógv gjørt burturúr matgerðini, og maturin er við til at skapa hugna og samanhald. Tað er tó skjótt, at maturin verður fongdur við alskyns bakterium, sum kunnu spilla jólahugnan.

Hitið matin

Tað er umráðandi, at ein rættur, ið skal borðreiðast lunkaður, verður hitaður væl ígjøgnum, og hann skal borðreiðast kókandi heitur. Hetta ger, at sjúkuelvandi bakteriur verður dripnar.

Um maturin skal hitast uppaftur dagin eftir er umráðandi, at hann er settur í kuldaskáp, beint sum máltíðin er liðug. Tá maturin verður borðreiddur aðru ferð, skal hann hitast væl ígjøgnum enn einaferð. Heitir rættir eiga bert at verða upphitaðir aftur eina ferð.

Allar matrestir skulu goymast í kuldaskápi við 5 hitastig ella lægri. Allar matvørur, ið spillast lætt, eiga at verða goymd í kuldaskápi við mesta lagi fimm hitastig. Nærum ongar bakteriur nørast við 5 hitastig ella lægri.

Ruddið kuldaskápið

Umráðandi er eisini, at maturin ikki liggur ov tætt í kuldaskápinum, tí so verður ov lítið av luft millum vørurnar, og hitin kann tískil hækka. Fyrireiking til jóla kann vera at rudda kuldaskápið, so gott pláss verður til vørurnar. Tær matvørurnar, ið ikki tørva kuldaskápshita, kunnu setast aðrastaðni.

Tað er harumframt eisini týdningarmikið, at ráur matur ikki kemur í samband við lidnan mat, so bakteriur ikki spjaðast á tann hátt.

Best er at gera ein rætt í senn og at vaska hendur, brettir, íløt, knívar og onnur amboð hvørja ferð skift verður ímillum tey ymsu matsløgini. Soleiðis slepst undan at spjaða bakteriur millum teir ymsu rættirnar.